## Van Gaal er í øðini

Hollendski venjarin hjá Bayern München, Louis Van Gaal, hevur givið til kennar, at hann milt sagt er í øðini inn á týska landsliðsvenjaran, Joachim Löw, tí hann hesa vikuna hevur kravt at fáa allar teir HM-aktuellu spælararnar innkallaðar til kropsliga venjing í fýra dagar. – Hetta er púra svakt. Fýra dagar eru long tíð, tí eg skal sjálvur fyrireika mítt lið til ein dyst, sigur rísni Van Gaal.



## United minkar skuldina

Sum so nógv onnur stór fótbóltsfeløg í hesum døgum, hevur Manchester United eina risastóra skuld, sum sigst liggja um fýra milliardir krónur. Men nú er felagið sloppið av við ein sera stóran part av skuldini í einum, tá fríggjadagi seldi United lánsbrøv fyri næstan tað sama sum alla skuldina. Tað gevur fyribils luft til spælarakeyp og annað, tí virðisbrøvini verða ikki innloyst fyrr enn í 2017.

# Meistarin lærdi frá

**Danska badmintonlegendan, Poul-Erik Høyer Larsen, ið júst hevur vitjað í Føroyum, hevur rós at bera føroysku spælarunum. – Kemur ein føroyskur spælari so langt, at hann røkkur europeisku elituna, vilja vit fegin rætta eina hjálpandi hond, sigur hann**

einslistir@kallnet.fo



**Hilmar Jan Hansen**



**– Við tí fólkagrundarlagi, tit hava í Føroyum, stendur sera væl til við góðum badmintonspælarum. Eg vóni, at vit koma at síggja ein føroyskan spælara á europeiskum úrvalsstigi, sigur Poul-Erik Høyer Larsen**
Mynd: Álvur Haraldsen

Tað var vorðið sum fongur, Ítróttarsambandið og Badmintonsambandið gjørdu, tá tað eydnaðist at fáa fyrrverandi donsku badmintonstjørnuna, Poul-Erik Høyer Larsen, at koma til Føroya í farnu viku. Hóskvøldið hevði hann fyrilestur fyri úrvalsítróttarfólkum og øðrum áhugaðum í Skálanum í Norðurlandahúsinum, og harumframt vandi hann eisini við fleiri av okkara bestu badmintonspælarum.

Í fyrilestrinum hóskvøldið greiddi Poul-Erik millum annað frá, at tað krevur miðvísa venjing í minst 10.000 tímar fyri at gerast eitt framúrskarandi ítróttarfólk, ið kann bjóða teimum bestu í heiminum av. – Tað er meira enn tveir tímar um vikuna, kann eg lova tykkum, segði hann millum annað.

Saman við Poul-Erik Høyer Larsen var eisini ítróttarstjórin í danska badmintonsambandinum, Finn Trærup-Hansen, við í Føroyum. Hann hevur ábyrgd av allari venjing av donskum badmintonspælarum, og fyrr hevur hann verið landsliðsvenjari hjá bæði Danmark, Australia og Ongland. Hann útdjúpaði hetta við teimum 10.000 venjingartímunum soleiðis:

– Ein danskur badmintonspælari er 24 og eitt hálvt ár, áðrenn hann er komin upp á 10.000 venjingartímar. Kinesisku badmintonspælararnir hava vant í 10.000 tímar, tá teir eru 19 ára gamlir, men longu, tá kinesiski spælarin er 22 ár, eru fleiri 19 ára gamlir spælarar komnir fram, ið eru uppaftur betri. Hetta er munurin á asiatiskum og europeiskum ítróttarhugburði, segði Finn Trærup-Hansen.

### Ovurstóra virðing

Tá teir báðir vóru við til venjing í Badmintonhøllini í Havn fríggjakvøldið, var stuttligt at síggja glógvandi eygunum í føroysku spælarunum – bæði teimum yngstu og teimum eldru. At her vóru tveir menn, ið veruliga høvdu nakað at læra frá sær, og at spælararnir veruliga vildu taka til sín, var eyðsæð.

Ikki minst var tað stuttligt at eygleiða innasta vøllin í høllini, har spælararnir fingu góð ráð frá Poul-Erik Høyer Larsen sjálvum. Tað vísti seg, at tá nýggir spælarar komu til, høvdu teir so stóra virðing, at teir næstan ikki tordu at sláa bóltin yvir um netið, men eftir lítlari løtu var alt meira róligt – ikki minst, tí gamli meistarin dugdi væl at fáa spælararnar at kenna seg væl.

– Jú, eg legði til merkis, at hesi ungu líka skuldu venja seg við, at tað var eg, sum stóð hinu megin netið. Men tá vit so komu í gongd, haldi eg, at vit øll høvdu tað stuttligt, og tað er eisini tað, ið er so umráðandi. Eg haldi, at spælararnir lurtaðu væl eftir og gjørdu, sum eg bað teir, segði Poul-Erik eftir venjingina, tá vit fingu orðið á hann til eitt stutt prát.

Sjálvur spælir hann slett ikki badminton longur, og heldur einki av børnum hansara hevur tann stóra hugin til ketsjaran og fjaðurbóltin, so tað er ikki á hvørjum degi, at hann er í gongd í tveir til tríggjar tímar, sum hann var tað fríggjakvøldið. Aftaná ásannaði hann eisini, at hann føldi tað á rygginum, at nú hevði hann verið longur í gongd, enn hann hevði verið tað leingi.

– Men eg vóni, at eg kann hava givið tykkara spælarum íblástur. Eisini vóni eg, at eg havi givið teimum innlit í, hvat tað merkir, at tú líka tekur tað allarsíðsta lítla við, sum kann gera avgerandi munin, segði 44 ára gamli dámligi danskarin, meðan hann turkaði sveittan av pannuni eftir lokna venjing.

### Vil fegin hjálpa

Tað skiltist á øllum brøgdum, at